

*Dóra, fosturdótturin, og maður hennara Palle*



*Ommusonurin Daniel*



*Lorvík, sum Trina minnist bygdina*



*Foreldrini hjá Trinu, Jógvan Vitalis og Olevina við Keldu*

Keypmannahavn og blakaðu úr flogførinum loftseðlar, har heitt var á danir um at vera kúrrar.

Seinni búði hon í Keypmannahavn. Hon skuldi møta kl. 6 á morgni, og tá møtti hon javnan marsjerandi týskarum. Hon var ikki fegin um týskararnar, men hinvegin merktist ikki so nógv til teirra, hóast teir búðu beint við.

## Trina giftist

Tað var um hesa tíðina, í 1943, at Trina giftist við Alfred Møller Jensen. Tey høvdu tá kenst í átta ár. Hann var føddur í Keypmannahavn men arbeiddi í Gentofte, har hann koyrdi vørur fyri eina forrætning.

Tey fóru heim til Føroya í feriu í 1946. Tá koma tey í prát við systkinabarnið Petur Juel Samuelsen. Petur ber í hesum viðfangi uppá mál, um Alfred vildi vera leiðari á vaskarínum hjá Kjølbro. Hetta ljóðaði mikið áhugavert, og hann tók av.

Tískil fluttu tey til Klaksvíkar í 1947 at taka við hesum starvi, og tey vóru í Klaksvík inntil 1965. Tey bygdu eisini í Klakvík tætt við skrivstovuna hjá Kjølbro. Tað var gott at vera, men eitt tíðarskeið var tað sindur buldrasligt. Her verður hugsað um læknastríðið, sum stóð uppá í fleiri ár. Tá vóru danir ikki so populerir, men Alfred hevði ongantíð nakran trupulleika av, at hann var dani.

Hann gavst í vaskarínum og fekk sær heilsølu. Hann hevði ein hjálparmann, og var tað systirsonur Trinu, Jógvan Clementsen. Sjálvur fór Alfred at ferðast kring landið sum handilsreisandi, har hann seldi alt møguligt frá klæði til automatir. Ættin í Føroyum sigur, at Alfred var ein sera skemtiligur og dámligur maður, og vermamman var so sera góð við hann.

## Trina hevur umsorgan fyri sínum

Alfred hevði altíð sagt, at hann vildi liva sínar seinastu dagar í Danmark, so tey fluttu niður aftur til Ørbæk. Her yvirtóku tey eitt reinsarí, har tey eisini búðu. Men tað gingu ikki nógv ár, so fór heilsan at bila hjá Alfred. Tey seldu fyritøkina og Alfred fór á eitt røktarheim, har hann doyði í 1978, 77 ára gamal. Sjálv flutti Trina í eina íbúð, har hon býr enn.

Tey bæði fingu ikki børn saman. Men í Føroyum tóku tey Dóru, dóttir Mariu, systir Trinu, til fosturs, og hon flutti við teimum niður. Samstundis búsettist Martin, beiggi Dóru, eisini í Ørbæk. Hann var leiðari á einum skúlaheimi fyri menningartarnað børn. Tað var hugaligt, at tey kundu hava ættarfólk so nær at sær.

Dóra er gift við Palle og býr nú í Rørvig, ikki langt frá Holbæk. Tey eiga ein son, Daniel, sum er automekanikari. Martin og konan, Inga, eru deyð, men tær tvær døturnar hjá teimum eru óførar at vitja.

Martin fekk blóðpropp og gjørdist púra óhjálpin 54 ára gamal. Hann kom á røktarheim, og sat har í seks ár, tá hann doyði. Men hvønn dag var Trina hjá honum við einum drekkamunni og franksbreyðbita við osti. Hon sat so og mataði hann, tí hann fekk ikki etið sjálvur.

Øll í Ørbæk kenna hana undir navninum "moster", tí hon hevur verið mostur at so mongum í Ørbæk eins og í Føroyum. Hon hevur eisini skil á allari ættini í fleiri ættarlið. Sigast kann, at Trina er ein megnarkvinna.

Trina ger enn hondarbeiði, og hon bindur teppi fyri ein hjálparfelagsskap. Tey verða send til India, har tað er brúk fyri tí.

Trina hevur sera gott samband við sína ætt. Verður farið til Danmarkar verður eisini farið at vitja Trinu, um tað liggur fyri. Tey verða eisini væl móttikin við tí ljósa lyndinum, sum Trina hevur. Alfred átti eina dóttur, sum býr í Amerika, og hana hevur Trina eisini gott samband við. Tey eru ikki nógv sum eru so nær tey 100 árini, sum eru so bragdlig.

Alt í alt kann sigast, at Trina er eitt gott umboð fyri Føroyar í Danmark, og tað var sera stuttligt at vitja hana, og vit senda henni eina heilsan.

Sosialurin